# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ringt at taka í egnan barm

Flestu munnu vera samd um, at Kaj Leo Johannesen og samgonga hansara hava spælt fallit, eftir at tað ikki eydnaðist at finna semju um fíggjarlógarkarmin. Tað skerst ikki burt, at eitt so umfatandi niðurlag hjá einum samgonguleiðara, at hann ikki megnar at fáa eina semju um nakað so grundleggjandi, sum hendan lógin um fíggjarkarmin er, eigur at fáa avleiðingar.

Fólk standa nú spyrjandi, um samgongan hevur nakran kjans. Í gjár vístu vit á, at Jóannes Eidesgaard tyktiskt ikki hava serligar vónir - og hann helt eisini fyri, at tá tingfólk ikki kunnu semjast og standa saman í hesum máli, so fer at bera illa til hjá nøkrum at halda saman upp á tingfólk í øðrum málum. Og rætt hevur hann. Í útvarpinum í gjár gav Magni Laksáfoss ábendingar um, at løgmaður heldur ikki hevur ein samdan flokk aftan fyri seg - soleiðis tykist Jóannes Eidesgaard vera tann einasti, ið hevur ein samdan flokk aftan fyri seg.

Tað verður spennandi at frætta um karmin hjá samgonuni, tá pakkin verður latin upp á tíðindafundi í morgin. Men eins vist er tað longu nú, at hettar uppskotið verður hoyggjað sundur í fíggjarnevndini, og so hava vit sama skilið aftur, sum vit plagdu at hava, tá tað nærkaðist 1. oktober, og eitt fíggjarlógaruppskot skuldi klaskast saman - og har teir ósamdu partarnir skuldu hava sítt fingramerki.

Í nógvum førum tykist tað, sum um fólk bara vilja halda upp á taburettirnar. Fólkaflokkurin, sum í roynd og veru hevur meldað seg úr samgonguni - ella er koyrdur úr samgonuni - tað veldst um eygað, sum sær - slær hetta málið upp í glens og vísir til, at talan »bara« er um eitt mál til samtyktar.

Um samgongan - ímóti øllum sólarmerkjum - klárar at at hóra undan, so verður tað bara fram til næsta leik. Tá Fólkaflokkurin hevur sett seg í andstøðu í samgonguni, so fær hann tað heilt víst afturlønt í onkrum av sínum hjartamálum.

Tað verður so mangan sagt, at eitt løgtingsval í ótíð hoyrir ongastaðni heima. Men tað er spurningurin, um tað ikki kortini hevði verið frægasta loysnin nú. So at siga allir flokkar hava verið í samgongu hetta góða hálva valskeiðið - og tí er spurningurin, um ikki eitt val í ótíð hevði reinsað luftina. Um ikki, so eru tey nógv, sum skulu taka í egnan barm, og tað er ikki júst tað, sum politikarar duga best...

**Sosialurin**

## Ljóðar heilsutrygd ov ljósareyð?

**BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN**



Nógv er at fegnast um við Heilsutrygd, avgjørt. Undraðist tó, nú eg hoyrdi heilsumálaráðharran siga frá í tíðindasendingini á middegi, hvussu øll fáa tað betri við nýggju lógini um Heilsutrygd. Lógaruppskotið bleiv skundað ígjøgnum og fylgjurnar av hesum eru ikki bara góðar.

Familjur, sum forsyrgja einum barni sum er sjúkt ella ber brek skulu sambært lógini um heilsutrygd rinda 1195 kr árliga í samband við neyðugar meirútreiðslur - eitt nú til heilivág. Í dag rinda hesar familjur einki.

Vit kunnu ímynda okkum, at hetta fer at ávirka fíggjarstøðuna hjá teimum familjum, sum eru sperdar fíggjarliga - ella hvussu, um ein familja hevur fleiri børn, sum hava tørv á heilivági?

**Hvør skal rinda meir?**
Skulu minnast til, at hettta í fleiri førum eru tær familjur, sum

- vóru skerdar í samsýningini tey fáa, fyri at taka sær av børnum sínum í egnum heimi, ofta tí tað almenna einki hevur at bjóða børnunum.
- ikki eiga rætt til pensjón av samsýning sínar
- í longri tíð ikki hava vitað, um tær eru keyptar ella seldar í mun til at fáa ergoterapi til børnini.

Hetta er als ikki í nóg gott. MBF hevur eisini gjørt vart við í hoyringssvari, at tey halda at familjur við sjúkum børnum ella børnum sum bera brek eiga at fáa allar útreiðslur endurgoldnar.

**Hvat sigur heilsumálaráðharrin?**
Vit kjakaðust dúgliga í løgtinginum, um júst hetta sama í farnu viku – tí broytingin gerst veruleiki 1. apríl. Sakni tó at hoyra landsstýrismannin í heilsumáulum siga sína fatan um júst hetta.

## Koddakríggj í sovikamarinum

**HØGNI HOYDAL**



**Samgonguflokkarnir eru ongantíð komnir úr songini, men sita enn og spæla koddakríggj í sovikamarinum. Teir áttu at lagt seg endaliga og latið tey, sum vilja broytingar, sloppið framat**

Veruligar broytingar í einum samfelag kunnu henda, tá bæði innanhýsis trýst og uttanhýsis umstøður virka saman við krøvum um atgerð og umstilling. Tá standa vit í einum sonevndum "søguligum gloppi", har tað er sera avgerandi, um vit megna at taka røttu avgerðirnar ella vit bara leggja okkum undir dýnuna og liggja sjóvarfallið av okkum.

Vit eru í eini slíkari støðu í Føroyum í dag, har vit kunnu taka ábyrgd og leggja um til burðardygd í okkara búskapi, vinnu og politiska skipan. Men sitandi ABC-samgonga hevur frá byrjan lagt seg undir dýnuna undir væðingini á heimastýrishúsunum. Og hon leggur støðugt fleiri og fleiri dýnur oman á alt samfelagið og atgerðarhugin hjá fólki.

Øll orkan fer til eitt standandi koddakríggj millum samgonguflokkarnar. Har fjølmiðlarnir dagliga varpa út innan úr sovikamarinum, sum var tað ein spennandi landsdystur, har samgonguleiðararnir skiftast um at stinga høvdið fram at greiða frá gongdini í koddakrígnum, meðan fjaðrarnir flúgva frá. Summir rýma av og á undan dýnuni og gera eitthvørt róp út í veruliga samfelagið, men skjótt verða teir drignir inn aftur undir dýnurnar at berjast við koddum.

Tað er eitt rættiligt bragd hjá øllum pørtum at halda uppi ímyndini av hesum landsdysti í ongum. Ongin veit, hvat málið er. Ongin veit, hvar bólturin er, ella hvørjum bólti spælt verður við. Ongin veit, hvørjar reglur galda. Ongin ætlar sær nakað við spælinum – uttan at júst at vera á vøllinum og sleppa í fjølmiðlarnar. Eitt er kortini víst, at hóast føroyska samfelagið tapir 50-null í hvørjum av hesum dystum samgongunnar, so kemur løgmaður út og fortelur okkum, at talan er um ein stórsigur til øll, og at øll hava vunnið.

Leingi hevur verið songartíð hjá sitandi samgongu, og alt bendir tíverri á, at um so allir heimsins hanar gala, so fæst hon ikki upp ella út í vindin. Og tað er niðurfaringartíð hjá tí gamla heimastýrisliga valdspolitikkinum hjá einstaklingum og flokkum, sum bara vendir inneftir og sum aftur og aftur leiðir okkum út í kreppur, forðar fyri broytingum og druknar í ábyrgdarundanstøkking og nalvaskoðan.

Frægast er tí, at samgongan bara leggur seg veruliga og letur tey, ið vilja gera nakrar veruligar broytingar og sum hava eina ætlan um at reisa seg, sleppa framat.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Jaspur Langgaard jaspur@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.